# ítróttur

Nr. 207 • fríggjadagur • 31. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# DM biðlarnir fingu allir fult

**Fýra tey fremstu vunnu, og nýggi svenski venjarin í AGF fekk trý stig burturúr, tá ið hann fyri fyrstu ferð var á beinkinum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Hóast summartíðin hvarv náttina til sunnudagin, so vóru bestu fótbóltsspælararnir í Danmark eisini í hesi vikuni í miðvikueldinum. Seinastu vikurnar hava Brøndby, Esbjerg, FCK og OB verið á fremstu plássunum. Tað eru tey framvegis, tí tey vunnu øll mikukvøldið.

Hóast so týdningarmiklir spælarar sum Todi Jónsson, Erik Mykland og Ole Tobiasen framvegis ikki eru førir fyri at spæla, og hóast Zuma ikki var komin meiri fyri seg, enn at hann leingi var á beinkinum, tá ið FCK mikukvøldið var í Aalborg, so megnaði FCK at vinna 1–0. Málskjútti var júst Zuma. Miðskeiðis í 2. hálvleiki varð hann settur á vøllin fyri Álvaro Santos, sum ikki stóð seg betri enn passaligt. Zuma hevði onkran góðan møguleika at skora, men hann misnýtti. Tá ið hann hevði verið ellivu minuttir á vøllinum, heilfluktaði hann sera elegant, eftir at Peter Møller, sum er í góðum tíðarskeiði, hevði lagt upp.

Í Aalborg løgdu bæði liðini størri dent á verjupartin enn á álopsspælið. Hetta var fyrsta ferðin, at AaB tapti, síðani teir fyrst í september skiftu venjara. Heimamenninir vóru sera misnøgdir við dómaran, sum teir hildu hevði snýtt teir fyri eitt brotsspark, og sum teir mettu ikki hevði víst reyða kortið, sum hann átti at havt á lofti fyri FCK neyðbremsu. FCK sigurin boðar frá, at teir framvegis eru á kambinum, sum teir leingi hava riðið á.

Í Brøndby vitjaðu grannarnir úr Valby. Nýggi venjarin hjá Frem, Ebbe Skovdal, er gamal kenningur í Brøndby, har hann fleiri ferðir hevur staðið á odda, tá ið liðið hevur vunnið DM. Mikukvøldið varð venjarin fagnaður av viðhaldsfólkunum hjá heimaliðnum, men tey fingu ein skelk, tá ið Frem legði seg á odda. Men Brøndby var betra liðið, og við 3–1 sigrinum hildu teir tørn um oddasessin.

Brøndby var ikki at kenn aftur í 2. hálvleiki, tá ið teir spældu væl betri enn undan hvíldini. Gongdin var meinlík henni sunnudagin, tá ið tað eisini var eftir steðgin, at Brøndby á útivølli fekk stigini til høldar ímóti botnliðnum AB. Tríggjar tær næstu ferðirnar skal Brøndby spæla ímoti FC Midtjylland, Schalke 04 í UEFA Cupini og FCK. Um fyrra umfarið verður eins vánaligt í hesum dystunum, sum tað hevur verið tvær tær síðstu ferðirnar, so rokna teir í Brøndby ikki við, at tað fer at bera til at fáa fulla úrtøku.

Ebbe Skovdal er mammubeiggi hjá Michael Laudrup, sum er venjari í Brøndby og hesa ferð fekk øll stigini ímóti mammubeiggjanum. Michael Laudrup var fyrst í áttati árunum við til at vinna DM við Brøndby. Tá var Ebbe Skovdal venjari hjá teimum.

Áhugin fyri heimadystinum ímóti FCK um góðar tvær vikur er ógvuliga stórur. Hóast heysarkuldan bendir alt á, at tað verður útselt, tá ið Brøndby fer at taka ímóti FCK.

Esbjerg er vorðið rættuligt topplið. Bæði á støðutalvuni og tá ið tað ræður um at sekta mistøkini hjá mótstøðumonnunum. Tað vístu teir, tá ið FC Midtjylland vitjaði. Tvær ferðir kiksaðu gestirnir í verjuni, og so vann Esbjerg 2–0. Harvið eru vesturjydarnir framvegis nummar tvey – aftan fyri Brøndby og frammanfyri FCK.

OB tóktist á heimavøllinum í Odense at vera á veg ímóti tapi, tá ið teir tíðliga í 2. hálvleiki kiksaðu í verjuspælinum, so Viborg kundi leggja seg á odda. Men átta minuttir seinni var støðan 3–1 til heimaliðið, sum vann 4–2.

Sören Åkeby var sunnudagin ábyrgdarmaður, tá ið svenska høvuðsstaðarfelagið, Djurgården, fekk gullkrónur fyri meistaraskapin. Týsdagin tók hann við sum venjari í AGF. Mikukvøldið møttu sjey túsund av trúgvu AGF áskoðarunum í vónini um, at nýggi venjarin skuldi geva kroystu spælarunum neyðuga íblásturin, og tað tóktist ganga væl. AGF vann 3–1 á botnliðnum AB, sum tapti fyri 9. ferðina á rað. Nýggi venjarin boðaði longu týsdagin frá, at hann ætlar at píska sínar spælarar, soleiðis at teir verða væl betri fyri, enn teir eru nú.

Fyri fimtu ferð á rað noyddist FC Nordsjælland at fara av vøllinum uttan at hava vunnið. Hesa ferð høvdu teir í Farum vitjan av Herfølge, sum megnaði 1–1. Chris Hermansen legði gestirnar á odda, og Tommy Olsen, sum FCN í síðstu viku keypti frá Køge, sum er í fíggjarligum ódnarveðri og droymir um at fusionera við Herfølge, javnaði.



*Við einum framúrskarandi málið tryggjaði Zuma stigini til FCK, tá teir mikukvøldið leiktu móti AaB í Aalborg*



# Turkaland ov stórur biti

**Hóast U–19 unglingarnir í 2. hálvleiki vístu besta avrikið á ferðini í Skotlandi, so taptu teir stórt ímóti Turkalandi, ið føroyingarnir mettu vera besta liðið, sum luttók í undankappingini**

U–19 EM UNDANKAPPING
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Føroyska U–19 landsliðið skuldi í gjárkvøldið koma aftur til Føroya, eftir at teir síðstu vikuna hava spælt tríggjar dystir í EM undankapping í Skotlandi. Tað ber ikki til út frá úrslitunum at siga annað, enn at ferðin hevur verið eitt vónbrot. Mikukvøldið tapti føroyska liðið 5–0 ímóti Turkalandi. Harvið var samantalda úrslitið fyri teir tríggjar dystirroyar endaðu aftast. Makedonia, sum mikukvøldið tapti 1–0 ímóti Skotlandi, endaði á triðja plássinum, Turkaland var nummar eitt og Skotland nummar tvey. Tey bæði londini halda fram í kappingini.

Sum tað hevur verið nevnt fyrr í vikuni, so hevur tað verið manningarliga soltið hjá føroyingunum, sum eisini hava verið mintir á, at í slíkum kappingum og ímóti sovornum mótstøðuliðum er tað einki sum eitur. Persónlig mistøk verða eirindarleyst sektað.

## Besta liðið

A–landsliðið hjá Turkalandi hevur seinastu árini víst, at teir teljast millum tey bestu í heiminum. Menningin hevur verið ógvuliga stór, síðani teir við Sepp Piontek á odda vóru í Føroyum og spældu 1–1 í Gundadali fyri tólv árum síðani.

At framtíðar landsliðsspælararnir hjá teimum eru óførir, vóru føroysku unglingarnir fremstu vitnini til mikukvøldið.

– Í 1. hálvleiki spældu teir okkum sundur og saman. Vit høvdu kanska fýra hornaspørk og onkran leysan møguleika, men teir vóru nógv betri og kundu havt fingið fleiri mál enn tey fýra, sum teir fingu, og sum teir spældu seg til við hugflogsríkum uppspæli, sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá U–19 unglingaliðnum.

Hóast stórtapið so heldur Jógvan Martin, at føroyska liðið í seinna umfarinum ímóti Turkalandi vísti besta avrikið á hesi ferðini.

– Okkara tordu hesa løtuna betri at spæla, enn teir høvdu gjørt frammanundan, og teir fingu eisini nógv betur fatur í verjupartinum og vunnu nærdystir. Vit kundu havt skorað eitt ella tvey mál. Men so skal leggjast afturat, at mótstøðumenninir kundu havt skoraði væl fleiri enn tað eina málið, sum teir fingu í 2. hálvleiki, sigur U–19 venjarin.

## Akkurát nóg nógvir

Tað var akkurát soleiðis, at tað eydnaðist føroyingunum at manna lið ímóti Turkalandi. Eftir útvísingina í fyrsta dystinum var Poul N. Poulsen eisini leikbannaður ímóti Turkalandi. Rasmus Nolsøe, sum hevði verið leikbannaður í tveimum teimum fyrstu dystunum, var tøkur aftur. Fleiri spælarar vóru skaddir, og tá ið tað síðstu løtuna var neyðugt at skifta út, var tað bara Bárður Olsen, sum var so mikið frægur, at hann kundi setast á vøllin. Men hann var ikki hundrað prosent.

Føroyska liðið í hesum síðsta almenna dystinum hjá einum føroyskum fótbóltsliði í ár sá soleiðis út: Gunnar Nielsen, Frem – Jónas Þór Næs, Frem, Rasmus Nolsøe, TB, Marni Djurhuus, EB/Streymur, Hanus Jacobsen, GÍ – Hanus Thorleifsson, Skála, Jústinus R. Hansen, NSÍ, Kjartan M. Højgaard, Vejle (Høgni Madsen, GÍ, 46.), Magnus Skoralíð, GÍ – Páll M. Joensen, HB, Rókur Jespersen, HB (Bárður Olsen, EB/Streymur, 80.)

AT VELJA PRENTSMIÐJU OG TIMBURMANN
ER NAKAÐ TAÐ SAMA

Tit vilja hava fatur á ti besta handverkaranum, honum, tit kunnu hava álit á, einum meistara, ið ikki leggur eykarokning oman á eykarokning.
Einum, sum kemur tann dagin, hann hevur lovað og verður liðugur tann dagin, hann hevur lovað.

Ljóðar hetta sum eitt brot burtur úr „Sagnum og ævintýrum"?

Á Hestprent smíða vit ikki hús, men vit gera alt grafiskt arbeiði.
Tað vil siga uppseting, prent og innbinding.

Tín prentlutur er í góðum hondum hjá okkum.
Hestprent gongur nú á tjúgunda ári, og eru vit vaksin til 20 starvsfólk.

Vilt tú vita meira, hava vitjan av sølumanni okkara, ella hava eitt tilboð sendandi,
so eru vit altíð til dystin fús

HESTPRENT
Dvørgastígur 7
Postsmoga 3118
110 Tórshavn
Tel: 314555 • Fax: 318 026
t-post: hestoy@hestprent.fo

# HS-kappingin

**Niðanfyri verða samlaðu úrslitini úr HS-kappingini, sum varð hildin um vikuskiftið, prenta**

Kapping:1 200 metra frí kvinnur innur

| Nr. Navn | ár | Felag | Tilm. tíð | Tíð |
|---|---|---|---|---|
| **Árgangur 91 til 92 :** | | | | |
| 1 Mona Simonsen | 91 | TS | 2.53.9 | 2.36.67 |
| 2 Bjørg Seloy | 92 | HS | 2.39.9 | 2.43.15 |
| 3 Sissal Petersen | 91 | VS | 2.58.0 | 3.02.67 |
| 4 Aster Thorsen | 92 | VS | 2.55.0 | 3.02.74 |
| 5 Anna Midjord | 91 | HS | | 3.07.49 |
| 6 Rakul Hauritz | 92 | VS | 2.56.1 | 3.10.01 |
| 7 Hjørdis M Henrysdottir | 91 | VS | 3.11.8 | 3.22.60 |
| **Árgangur 89 til 90:** | | | | |
| 1 Anna K Eysturberg | 90 | TS | 2.37.4 | 2.35.00 |
| 2 Jenny Olsen | 89 | Flot | 2.35.8 | 2.35.76 |
| 3 Heidi Strømsten | 90 | Skeggjar | 2.37.1 | 2.35.84 |
| 4 Helga Djurhuus | 89 | HS | 2.30.2 | 2.38.59 |
| 5 Kirstin Rasmussen | 90 | Skeggjar | 2.48.0 | 2.50.99 |
| 6 Eyðbjørg Petersen | 90 | Skeggjar | 3.07.1 | 2.59.93 |
| 7 Gunnhild Alstup | 90 | HS | | 3.02.26 |
| 8 Sanna Laksá | 90 | Skeggjar | 3.14.5 | 3.03.89 |
| 9 Vivian Müller | 90 | VS | 2.49.7 | 3.09.63 |
| 10 Ann Mari Midjord | 90 | VS | 2.58.5 | 3.09.64 |
| 11 Barbara Gregersen | 90 | Skeggjar | 3.16.2 | 3.19.87 |
| 12 Inga Weihe | 90 | Skeggjar | 3.16.6 | 3.22.60 |
| 13 Karin Haraldsen | 90 | HS | | 3.36.56 |
| **Árgangur 87 til 88:** | | | | |
| 1 Lisbeth Joensen | 87 | HS | 2.18.4 | 2.20.83 |
| **Árgangur 86 og eldri :** | | | | |
| 1 Rannvá Jacobsen | 82 | HS | 2.22.0 | 2.24.52 |
| 2 Heidi Andreasen | 85 | HS | 2.35.5 | 2.40.93 |
| 3 Halla W Reinert | 86 | HS | 2.33.8 | 2.45.39 |

**Kapping:2 200 metra frí menn**

| Nr. Navn | ár | Felag | Tilm. tíð | Tíð |
|---|---|---|---|---|
| **Árgangur 91 til 92:** | | | | |
| 1 Pauli Mohr | 91 | FS | 2.19.3 | 2.19.55 |
| 2 Joan Símun Edmundsen | 91 | Flot | 2.48.5 | 2.39.13 |
| 3 Arnhold Davidsen | 91 | Flot | | 2.40.13 |
| 4 Remi Langgaard | 91 | Flot | | 2.43.43 |
| 5 Jákup Símun Jacobsen | 91 | HS | 2.47.9 | 2.53.25 |
| 6 Tórur A. Hansen | 91 | HS | | 3.06.77 |
| **Árgangur 89 til 90:** | | | | |
| 1 Hanus Eysturdal | 89 | HS | 2.11.3 | 2.14.26 |
| 2 Jákup Mohr | 89 | FS | 2.19.1 | 2.14.74 |
| 3 Kári J á Høvdanum | 90 | Skeggjar | 2.20.65 | 2.24.73 |
| 4 Danjal Martin Hofgaard | 89 | VS | 2.35.0 | 2.32.19 |
| 5 Pál Joensen | 90 | VS | 2.50.5 | 2.36.38 |
| 6 David Simonsen | 90 | FS | 2.44.9 | 2.41.52 |
| 7 Sveinur Magnason | 90 | FS | 2.44.9 | 2.42.72 |
| 8 Torstein Boðason | 90 | HS | 2.59.8 | 2.52.60 |
| **Árgangur 87 til 88:** | | | | |
| 1 Bogi Jorgensen | 88 | HS | 2.19.9 | 2.15.57 |
| 2 Beinir Danielsen | 88 | Flot | 2.12.53 | 2.16.14 |
| 3 Egil Gunnarsson | 87 | HS | 2.10.5 | 2.16.20 |
| 4 Haraldur Eið | 87 | Skeggjar | 2.19.5 | 2.19.92 |
| 5 Tróndur Olsson | 87 | HS | 2.35.7 | 2.37.17 |
| 6 Bárður Jacobsen | 87 | Skeggjar | 2.38.73 | 2.38.05 |
| 7 Egil Hvannastein | 87 | HS | 2.43.6 | 2.42.13 |
| **Árgangur 86 og eldri:** | | | | |
| 1 Andrass Thomsen | 82 | HS | 2.03.9 | 2.00.44 |
| 2 Jóannes á Fløtti | 84 | HS | 2.05.25 | 2.07.39 |
| 3 Sonni Eliasen | 79 | FS | 2.08.1 | 2.10.40 |

**Kapping: 3 100 metra firvald kvinnur**

| Nr. Navn | ár | Felag | Tilm. tíð | Tíð |
|---|---|---|---|---|
| **Árgangur 91 til 92:** | | | | |
| 1 Elspa Mørkøre | 91 | Skeggjar | | 1.18.97 |
| 2 Aster Thorsen | 92 | VS | 1.58.1 | 1.48.52 |
| **Árgangur 89 til 90:** | | | | |
| 1 Hildibjørg Joensen | 90 | TS | | 1.23.82 |
| 2 Barbara á Líðarenda | 90 | Skeggjar | 1.35.5 | 1.25.85 |
| 3 Heidi Strømsten | 90 | Skeggjar | | 1.32.90 |

**Kapping:4 100 metra firvald menn**

| Nr. Navn | ár | Felag | Tilm. tíð | Tíð |
|---|---|---|---|---|
| **Árgangur 91 til 92:** | | | | |
| 1 Joan Símun Edmundsen | 91 | Flot | 1.35.98 | 1.30.05 |
| 2 Remi Langgaard | 91 | Flot | 1.33.8 | 1.35.05 |
| **Árgangur 89 til 90:** | | | | |
| 1 Runi Klein Hansen | 89 | HS | 1.09.7 | 1.10.98 |
| **Árgangur 87 til 88:** | | | | |
| 1 Búi Rouch | 88 | HS | 1.15.0 | 1.11.82 |
| 2 Ottar í Hjøllum | 87 | Flot | 1.12.15 | 1.15.47 |
| 3 Beinir Danielsen | 88 | Flot | 1.10.62 | 1.15.61 |
| **Árgangur 86 og eldri:** | | | | |
| 1 Janus Olsen | 86 | HS | 1.02.6 | 1.05.56 |
| 2 Andrass Thomsen | 82 | HS | 1.06.71 | 1.05.66 |
| 3 Jóannes á Fløtti | 84 | HS | 1.06.70 | 1.09.07 |

**Kapping:5 200 metra bringa kvinnur**

| Nr. Navn | ár | Felag | Tilm. tíð | Tíð |
|---|---|---|---|---|
| **Árgangur 91 til 92:** | | | | |
| 1 Malan Bærendsen | 91 | TS | 3.18.8 | 3.19.01 |
| 2 Rakul Hauritz | 92 | VS | 3.38.5 | 3.45.42 |